## VIÐMERKINGAR

# Felagsskapur gevur møguleikar



VAL05

**Elin Heðinsdóttir Joensen**
*fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*

Í politikki er altavgerandi, at tú fyriheldur teg til veruleikan, soleiðis sum hann sær út. Og føroyski veruleikin er tann, at vit eru í ríkisfelagsskapi við Danmark og Grønlandi. Summi ynskja meira enn bara ríkisfelagsskap og summi loysing, men tað eru bert ynski - og ikki tann politiski veruleiki.

Gjøgnum hesi skjótt 60 árini, síðani heimastýrislógin kom í gildi, hevur føroyska samfelagið ment seg og tikið seg fram á mongum økjum. Um tað hevði verið so uttan ríkisfelagsskapin, fáa vit ongantíð at vita, men tað er lítið hugsandi. Í øllum førum kunnu vit tilskriva ríkisfelagsskapinum nógvari av okkara framgongd og menning.

Tá tað er sagt, so er eisini greitt, at tíðin er komin at endurskoða ríkisfelagsskapin og tær fyritreytir, hann hevur at virka undir. Tíðirnar broytast og vit broytast við, og tí vil Javnaðarflokkurin eisini gera sítt til, at føroyingar koma at liva í einum dagførdum felagsskapi, har vit sjálv gera av, hvørji stig verða tikin - hvørt tað so er at einum tættari ella einum leysari felagsskapi.

Fast stendur, at ríkisfelagsskapurin gevur okkum eina ørgrynni av møguleikum, vit ikki eins lætt kundu fingið, stóðu vit uttan fyri felagsskapin og ikki høvdu atgongd til ta viftu av møguleikum, vit kenna so væl innan útbúgving, sjúkrarøkt og onnur øki, ið smáu Føroyar illa kundu vunnið okkum uttan samstarv við onnur.

Javnaðarflokkurin læsir seg ikki fastan í, at ríkisfelagsskapurin skal vera tann sami í allar ævir, men vil brúka henda felagsskap sum eitt amboð, ið alsamt skapar menning og møguleikar, so liviligt verður hjá øllum í landi okkara. Pláss skal vera fyri tí minsta og tí størsta, tí vit skulu jú øll vera her.

Vilt tú hava eina føroyska rødd á fólkating, ið talar tína søk og hyggur frameftir, er eitt Javnaðarumboð títt besta boð. Tín møguleiki at verða hoyrdur, er at atkvøða fyri lista C, so vit fáa eitt væl valt Javnaðarumboð á fólkating!

# Vel so tað munar



VAL05

**Vel eina føroyska rødd á fólkatingi, ið styðjar upp undir eina framhaldandi fullveldisgongd og varpar ljós á føroysk viðurskifti**

**Heidi Petersen**
*løgtingskvinna*

### Føroysk rødd á fólkatingi

Ofta verður røtt um, um tað er rætt ella skeivt at luttaka í arbeiðinum í danska fólkatinginum. Tjóðveldisflokkurin er grundleggjandi av tí fatan, at vit ikki hoyra heima í danska fólkatinginum, men so leingi vit ikki hava fullveldi, vilja vit nýta allar atkomuligar pallar at tala okkara søk.

Við luttøku í fólkatingsarbeiðinum hava vit høvi at gera vart við føroysk viðurskifti, vit fáa varpað ljós á serligu áhugamál okkara og vit fáa kunnað um føroysk viðurskifti á øllum økjum. Gjøgnum samstarvið í Norðuratlantsbólkinum fáa vit ein nógv størri leikpall, enn føroyingar annars hava havt á fólkatingi — tó uttan at tengja Føroysk og Grønlendsk áhugamál saman.

### Hvat sigur veljarin um ABC – og E

Eitt áhugavert verður við hesum vali fram um onnur fólkatingsval: At fáa at vita, hvat føroyski veljarin sigur til breiðu ABC-samgonguna, sum nú í eitt ár hevur rikið ein sera sambandssinnaðan politikk á tí ríkisrættarliga økinum - ein sera passivan vinnupolitikk, har fáa mál eru at hóma á tí sosiala økinum.

Fer veljarin at geva til kennar, hvat hann heldur um tað, sum farið er fram seinasta árið, ella fer veljarin at nýta høvi at gera vart við, at hann eisini hevur tørv á flokki, sum setur sær mál og vil stríðast fyri hesum málum bæði heima og á fólkatingi. Tá verður einasta valið at seta X við E tann 8. februar.

### Vel so tað munar

Vilt tú hava eina føroyska rødd á fólkatingi, vilt tú vísa, at tú styðjar upp undir eina framhaldandi fullveldisgongd og vil tú, at tín atkvøða ger mun bæði við at varpa ljós á føroysk viðurskifti í danska fólkatinginum og at reisa mál, sum hava føroyskan áhuga, so er einasti møguleiki at velja eitt sterkt tjóðveldisumboð á fólkating.

Vel so tað munar!

# Sum at ganga grýla



VAL05

**Martin Dam**

Øll bidda um atkvøðurnar

ABC, tað førir ongan veg, men listi E vil arbeiða fyri teg.

Ógvuliga nógv verður sagt og lova uppundir vali. Tað mesta er bluff, og ein slutur fyri ein slatur.

Tað verður lova ávirkan og seriøst lobby virksemi, møsn og luftkastellir.

Tjóðveldisflokkurin er einasti flokkur í ítøkiliga hevur roynt at skapt størri ávirkan, fyrst við at byrja Norðuratlansbólkin, fyri síðani at fáa ljóskastaran á yvir 60 mál seinastu árini.

Ymsar meiningar eru um hvat fæst burturúr arbeiðinum, ivaleyst kunna tey sum siga lítið, grundgeva fyri tí. Men allíkavæl fer Tjóðveldisflokkurin ótroyttiliga at halda áfram við at reisa mál og seta fyrispurningar á danatingi. Føroyum at frama.

ABC flokkarnir tosa um samstarv, teir hava enn ikki skilt at Danmark samstarvar við ES, og metir okkum bert sum eitt haft um beini.

Vel so tað munar - eitt sindur - vel E

# Latið okkum nú fáa nøkur úrslit!



VAL05

**Katrin Dahl Jakobsen**
*Javnaðarflokkurin*

Tað er hóast alt tað, ið telur. Og nú skuldi verið lagamanni at farið til verka. Við Javnaðarflokkinum á odda, sum er hin savnandi flokkurin í ríkisrættarligu viðurskiftunum, hevur ABC-samgongan megnað at jarða alt briksl og kegl. Nú er arbeiðsligt aftur! Hetta hevur stóran týdning - eisini fyri fólkatingsarbeiðið. Hvussu kann nakar taka okkum í álvara, um ein meldar út í eystur og annar í vestur? Hvørjum av hesum skulu danir trúgva? At vit hava fingið innanhýsis semju í lag, er eitt satt vælsignilsi og slóðar fyri, at vit aftur fara at lyfta í felag, og føra okkum fram sum mentað fólk.

Javnaðarflokkurin fer ikki til val við bíligum og ógloymandi herrópum sum "oljan er funnin", sum vit minnast formann tjóðveldisfloksins markera seg við til seinasta fólkatingsval. Vit fara á Fólkating við tí fyri eyga at samstarva við allar flokkar. Okkara loysnir byggja á veruleika, nýhugsan og breiðar semjur. Vit fara at brúka teir fyrimunir vit hava og leita upp nýggjar møguleikar. Og teir finnast!!

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Hvør lýgur um olju?

VAL05

**Jógvan Jacobsen,**
*formaður Unga Tjóðveldisins*

Sambandsmenn, t.d. Helgi Abrahamsen og Virgar T. Dalsgaard, siga aftur og aftur, at eingin olja er funnin á føroyskum øki og leggja tjóðveldisfólk undir at lúgva, tá tey siga nakað annað.

Olja er ikki funnin á føroyskum øki, siga sambandsmenninir Helgi Abrahamsen og Virgar Dalsgaard. Hetta er loddrøtt lygn.

Eg kann upplýsa, at olja ER funnin á føroyskum øki. Eitt samtak við Amerada Hess á odda hevur funnið olju. Men samtakið er ikki farið undir framleiðslu - enn.

Samtakið kann fara undir framleiðslu í morgin, um tað vil. Eg havi sjálvur tosað við Amerada Hess, sum váttaði mær hetta, sum eg her upplýsi.

Tað eru hvørki Helgi Abrahamsen, Virgar T. Dalsgaard, Høgni Hoydal ella eg, sum avgera nær og um oljuframleiðsla fer í gongd. Hetta avgera oljufeløgini einsamøll. Men olja er funnin.

Altso eru tað ikki tjóðveldisfólk, sum lúgva um olju, men sambandsmenninir Helgi Abrahamsen og Virgar T. Dalsgaard.